Umbering

Anny Hansen
Tórshavn, tann 22.11.2000

Vísandi til Oyggjatí›-indi, mikudag tann 4. okt. 2000 vil eg vi› hesum bi›ja Blákross-heimi› um umbering fyri ta›, eg førdi fram um stovnin í forsí›u-grein henda dagin. Eisini vil eg bi›ja um umbering fyri ta› eg skriva›i um navngivnar persónar í somu grein. Eg vil vi› hesum, heilt og fult taka aftur, ta› i› sagt var í nevndu grein, bæ›i um stovn og persónar. Nevnast skal, at eg havi roynt at fingi› Oyggjatí›indi at seta mær hesa umbering í bla›i›. Hetta eydna›ist ikki, hóast eg skriva›i mítt navn undir fyrru greinina og solei›is hev›i ábyrgd av henni sjálvt.

Emil 85 ár

27.11.2000



Bo›ar tú til allar tjó›ir:

»Æra skalt tú fa›ir tín,
æra skalt tú tína mó›ur,
so tær fylgir signing mín.
Landi› gevi eg tær tá,
leingi tú har liva má,
fólki› títt tá skal eg kenna,
me›an øld um øldir renna.«

Føroya mál á manna tungu
merkir: her b‡r Føroya fólk.
Slektir fornu og tær ungu
ey›kendu seg sum ein bólk,
i› helt fast vi› fedra mál,
virdu ta› av hug og sál,
gloymdu ikki ættarbandi›:
byggja tí enn hetta landi›.

TIL LUKKU VI‹ DEGNUM

Tíni vinfólk

VI‹MERKINGAR

Bla›ma›urin og bandupptakarin

John Johannessen
bla›ma›ur

Nakrar vi›merkingar í sambandi vi› kjaki› millum Tórbjørn Jacobsen, landsst‡rismann, og Sosialin um endurgevingar og prófførslur

Nógv strí› hevur tiki› seg upp um grein, sum eg havi skriva› í Sosialinum fyri mikudagin 22. november. Í hesi grein endurgav eg millum anna› landsst‡rismannin í mentamálum fyri at siga, at løgma›ur er danskur leigusveinur og at hann hevur fleiri lík í lastini.

Landsst‡risma›urin hevur sí›ani avsanna› hetta og meginpartin av greinini. Men samrø›an er tikin upp á band, og tí kann prógvast, at landsst‡risma›urin veruliga hevur sagt hetta. Sjónvarpi› prógva›i hetta eisini, tá ta› mikukvøldi› spældi brot úr bandupptøkuni í Degi og Viku.

Hetta hevur sí›ani ført til kjak, um ein bla›ma›ur kann loyva sær at taka eina samrø›u upp á band uttan at kunna hin partin.

Lat meg beinan vegin gera greitt, at hendan rættin hevur bla›ma›urin. Hetta sta›festir nógv virdi løgfrø›ingurin og journalisturin, Knud Aage Frøbert, sum var serfrø›ingur í fjølmi›laløgfrø›i, í bók síni »Massemediernes Frihed og Ansvar«.

Danski serfrø›ingurin setir spurningin í samband vi› grein 263 í donsku revsilógini, sum sn‡r seg um »Ulovlig aflytning m.m.«. Út frá hesum sta›festir hann, at ein journalistur, sum tekur eina samrø›u upp á band, ikki handlar móti lógini. Heldur ikki, um hann ikki frammanundan hevur kunna› hin partin um, at samrø›an ver›ur tikin upp á band.

Í Føroyum er danska revsilógin galdandi í føroyskum líki og vit hava onga fjølmi›laábyrgdarlóg. Tí mugu grundgevingarnar hjá Frøbert eisini vera galdandi fyri føroysk vi›urskifti.

Sí›ani ber til, at spyrja, um ta› er moralskt rætt av einum journalisti at taka eina samrø›u vi› ein landsst‡rismann upp á band, uttan at kunna hann um hetta frammanundan. Ta› er ta› – serliga í hesum føri.

Fjølmi›laserfrø›ingar hava í spurninginum um bandupptøkur fleiri fer›ir víst á, at ein politikari eigur at vita, at bandupptakarin er eitt heilt vanligt arbei›stól hjá einum journalisti, og tí er ikki ney›ugt at kunna ein politikara um, at hann ver›ur tikin upp á band. Hetta sama gjørdi danska pressuetiska rá›i›, tá ta› ikki vildi gera regluger› um n‡tslu av bandupptakara.

Í hesum sambandi kann eg vísa á, at eg vanliga ikki taki samrø›ur upp á band uttan talan er um okkurt heilt serligt, og tá kunni eg hin partin um ta› frammanundan.

Tá eg fór undir samrø›una vi› Tórbjørn Jacobsen var bandupptakarin sløktur. Men tá landsst‡risma›urin fór at svara mínum spurningum vi› grovum skuldsetingum móti løgmanni, leg›i eg bandupptakaran at telefonini.

Samrø›an vardi eina gó›a løtu, og ongantí› undir samrø›uni fekk eg varhugan av, at landsst‡risma›urin ikki meinti og ikki kundi standa vi› tey or›ini, hann hev›i sagt.

Landsst‡risma›urin var frammanundan kunna›ur um, at samrø›an var ein samrø›a til bla›i›. Tí metti eg ta› vera rætt at endurgeva landsst‡rismannin. Ta›, sum ein landsst‡risma›ur sigur, átti at veri› so miki› rætt, at ta› kann endurgevast.

Í hesum førinum hevur ein landsst‡risma›ur beinlei›is úttala› seg til ein fjølmi›il ógvusliga um løgmann. Fjølmi›lar hava sambært grundlógini og mannarættindasáttmálanum rætt til frítt at kunna bera tí›indi, uttan at landsins myndugleikar skulu gó›kenna tey frammanundan.

Sambært donsku regluger›ini fyri fjølmi›lasi› br‡tur ein journalistur gó›an fjølmi›lasi›, um hann heldur aftur t‡andi upplýsingum, sum almenningurin eigur at fáa at vita. Tí er mín leiklutur í hesum máli fult í trá› vi› galdandi lógir og gó›an fjølmi›lasi›.

Hvat ver›ur ta› næsta?

Rani Wardum
Ein fyrrverandi fólkafloksveljari

Nú gjørdi Tjó›veldisflokkurin ta› aftur. Hesir mans, i› siga seg vilja st‡ra hesum landi vi› viti og skili. Ta› sí›sta – Torbjørn Jacobsen, landsst‡risma›ur – sum vi› lygnum og ryggsvimjan roynir at afturvísa, at hann er lopin fram av og skírt okkara løgmann ein hentan ørindasvein hjá dønm. Her er eitt dømi um ein mann, sum *ikki* hugsar vi› høvdinum.

At løgma›ur ikki ger meira vi› máli› enn at gó›taka eina umberging frá Torbirni, vísir ein vissan veikleika frá hansara sí›u.

Til løgmann: um tú gó›tekur, at Torbjørn Jacobsen flytur frídagin frá okkara grundlógardegi til tann 1. mai, hvat ver›ur so ta› næsta. Lat okkum taka eitt dømi: lat okkum siga, at ein persónur frá t.d. Jehova vitnum kemur í landsst‡ri›, har hann tekur avger› um, at jólini skulu strikast sum frídagar. Skal ta› gó›takast? Øllum vitandi halda Jehova Vitni ikki jól.

Hin tjó›veldisma›urin í landsst‡rinum – Karsten Hansen – hevur ey›vita› sama trupulleika. Hann hugsar ikki á›renn hann »stingur út í korti›«. Ta› sí›sta dømi› er hansara avger› um pensiónsuppsparing, sum skal setast í verk á n‡ggjárinum.

At seta hetta stóra mál so skjótt í verk uttan at forhandla seg fram til eitt úrslit vi› allar partar á arbei›smarkna›inum, vísir eina inkompetancu, sum ongasta›ni hoyrir heima. Í hesum máli hevur hann enn einafer› *ikki* brúkt høvdi› at hugsa vi›.

At Fólkaflokkurin gó›tekur eina skattahækking, vísir bara, hvat fyri vingluskøltar tit í veruleikanum eru. Enn eitt dømi um, at tit halda ikki givin lyfti.

Eg valdi at blíva ver›andi í tíndi okkara, tá ringast stó› til fyri nøkrum árum sí›ani, sjálvt um ein so at siga livdi á hungursmarkinum (2 vaksin og 4 smábørn høvdu undir 2.000 kr. at liva fyri um mána›in, tá fastar útrei›slur vóru goldnar). Eg valdi at blíva ver›andi og gjalda mín skatt vi› tí vón, at ta› mátti blíva betri umstø›ur at liva í hesum landi framyvir. Men vi› hesum útspæli frá Karstin Hansen vi› eini skattahækking havi eg sæ› skriftina á vegginum. Hetta er nokk bara byrjanin til enn størri avgjøld/skatt til ta› almenna.

Eg haldi ta› vera ólukksáliga frekt av Karstin Hansen vi› einum yvirskoti uppá 500 milliónir í ár í landskassanum, har eg í ríkiligt mát havi goldi› mín part, skal ver›a vi› til at gjalda eina undirlutakensluhjá tjó›veldismonnum, sum teir kalla fullveldi.

At Høgni Hoydal hevur eina meining um framtí›arstø›u Føroya, skal hann hava loyvi til, har ein má respektera, at hann arbei›ir fyri síni ásko›an. Hann skal bara ikki draga okkum onnur (ca. 75% av Føroya fólki) inn í hansara ævint‡rkendu ver›. Í nógvum førum haldi eg hansara ævintalilsi um eitt komandi fullveldi hoyra heima í barnaútvarpinum, har ævint‡rsøgur ver›a fortaldar fyri børnum.

Høgni Hoydal, eg vil geva tær eitt gó› rá›: Um tú vilt hava álit millum vanligar borgarar, legg so øll kort á bor›i› og fortel okkum, at eitt fullveldi kostar, bæ›i hvat vi›víkur at lønir fara at ganga ni›ur samstundis sum skatturin veksur. Flestu føroyingar vita, at 2+2 er 4.

Í mínari ver› er hetta revolvarapolitikkur av ringasta slagi.

Eitt anna›, eg í mínum stilla sinni havi hugsa› um er, hví ikki n‡ggjur sjónvarpsstjóri er settur. Er tann stjórasessurin oyramerktur til ein ávísan landsst‡rismann í fullveldismálum, tá valskei›i› er um at enda, og sum skal útnevnast av Torbirni Jacobsen.

Skulu vit veruliga st‡rast av hesum monnum framyvir – og kanska sum ein tjó›.

Gud ná›i okkara elska›a Føroya land.

ítróttur

Nr. 228 • leygardagur • 25. november 2000 • 74. árgangur • www.sosialurin.fo

StÍF-Kyndil 29-34 (11-15)

Kyndil krása›i

Saman vi› restini av kyndilsli›num var Bjarni Wardum til tí›ir flúgvandi hósdagin

Mynd: Álvur Haraldsen

Eftir eina laka byrjan hevur Kyndil nú rættiliga fingi› fer› á, og hósdagin s‡ndu teir stórspæl, ta fingu teir tvey stig burtur úr torføra útidystinum á Skála

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Ta› var ikki sørt av spenningi undan dystinum millum StÍF og Kyndil hóskvøldi›. Hetta vóru tey bæ›i li›ini, sum tykjast skula berjast um rættin at fylgja vi› vestmenningum, og eftir sgiruin hjá Kyndli tykjast ta› nú vera teir, i› hava besta førleikan til hetta.

Byrjanin upp á kappingarári› hevur annars veri› alt anna› enn nøktandi hjá teimum grønu, men eftir at teir fyri einum trimum vikum sí›ani fingu seinkt skeivu gongdini, tykist bert at hava gingi› framá.

Á odda alla tí›ina

At sjálvsáliti› og viljin veruliga eru í hæddini hjá Kyndli, sást eisini alt fyri eitt í dystinum á Skála.

Grunda› á eina sera vælvirkandi verju fingu teir alt fyri eitt lagt sjógv ni›ur til mótstø›una. Tann sannroynd, at StÍF ongantí› megna›i at fáa samband vi› Kyndil á máltalvuni sigur eisini naka› um, hvør teirra lutur var í dystinum.

Rættiliga leyst slapp Kyndil onganti›, men hinvegin megna›u teir hvørja fer› at svara aftur, tá StÍF hev›i toga› seg eitt sindur fram. Naka› sum vitnar um sinniligt yvirskot, og sum samstundis eisini er mø›andi og drepandi hjá mótstø›uli›inum.

Verjan og Jens

Sum nevnt var ta› fyrst og fremst í verjupartinum, at sigurin var› grundlagdur. Ikki bara sást hetta í spælinum, men ta› hoyrdist so sanniliga eisini aftur í høllini. Vi› uppbakkandi rópum stu›la›u leikararnir alla tí›ina undir hvønn annan, naka› sum eisini vitnar um sinniligt yvirskot, ti positivu rópini til vi›leikarar koma sjáldan fyrr enn egna spæli› koyrir sum ta› skal.

Ikki minst er hetta galdandi fyri Regini Petersen, sum hevur ment seg ótrúliga nógv í verjupartinum, har hann at kalla hvørja fer› avloysti Jónleif.

Harumframt tykist ta› nú fullkomuliga greitt, at í Jens Skipagøta hevur Kyndil veruliga fingi› fatur á einum av bestu málverjunum í landinum. Um so er, at nakar iva›ist frammanundan.

Hann bæ›i st‡rdi verjuni, solei›is at ta› gjørdist léttari at verja fyri skotunum, umframt at hann eisini hev›i fleiri frálíkar bjargingar, tá menn komu leysir. Krúnan á verki› var so, at hann eisini tók tr‡ tey fyrstu brotskøstini frá mótstø›umonnunum.

Nógvir streingir

Í álopspartinum smæddust kyndilsmenn heldur ikki burtur í dystinum. Í fyrrverandi strandavenjaranum, Jónleif Sólsker, hevur Kyndil fingi› gamla spælskiparan aftur, men hetta merkir ikki, at álopsspæli› gerst einstátta›.

Tvørtur ímóti var› sjónligt, at streingirnir í Kyndilsálopinum eru nógvir og gó›ir. Serliga var› hetta hetta sjónligt móti endanum. Tá royndi StÍF at skerja Kyndilsflogi› vi› at mansverja Bjarna og Jónleif, men hetta hjálpti tó líti›, og eftir at Kyndil aftur fekk økt í tr‡ mál skrambla›i korthúsi› hjá heimali›inum saman.

Annar s‡ndu serliga teir tríggir, Jónleif, Bjarni og Uni sera gott og umhugsi› álopsspæl. Strikuspæli› rigga›i væl, hóast Janus Einar bert fekk veri› vi› lítla løtu, tí Rúni s‡ndi, at ta› avgjørt ikki er av tilvild, at at hann eisini var› úttikin til landsli›i›, sum hann nú hevur givi› avbo› til.

Harumframt eigur eisini eitt her›aklapp at ver›a latti› ungu vongspælarunum. Me›an Hans Áki hev›i leikbann í tveir dystir, hava hesir at kalla yvirtiki› pláss hansara, og hóast hann spældi seg sera væl upp, tá hann fekk meira tí› á vøllinum í seinnu hálvleiki, so skal hann als ikki kenna seg tryggan á sessinum. Fram um hinar evur hann tó ein ótrúligan strí›svilja, og er sera sterkur í verjupartinum.

Bilflokkarnir

Omanfyristandandi kann kanska fyri summi ljó›a sum ein skammrósan av kyndilsavrikinum. Ta› er tó einki at dylja yvir, at StÍF eisini átti sín part í undirhaldinum. Talan er jú sjáldan um nakran gó›an dyst, um talan ikki er tvey gó› li›.

Ta› stendur tó fast, at framgongdin hjá Kyndli frá seinastu umførunum stendur vi›, eins og ta› kanska serliga tóktist vera viljin og áræ›i til at vinna, sum lyfti teir upp um strandingarnar heta kvøldi›.

Ein hevur næstan hug til at samanbera li›ini bæ›i vi› ein diesel-motor og ein bensin riknan. Sum kunnugt, so er aloftast lættari at starta ein bensinmotor, tí diesel motorurin skal fyrst hava eina glø›ití›, og sí›ani eisini gera rættiliga heitur, á›renn hann koyrir, sum hann skal.

Um diesel-motorurin hjá Kyndli er eins gó›ur og teir hjá Daimler-Benz skal tó ikki sta›festast her og nú, men helst fæst ein grei› ábending um hetta, tá teir um tvær vikur skulu royna seg móti VÍF, sum higartil hevur koyrt í sama stíli, sum Schumacher ger í heitasta bilflokkinum.

Dysturin í tølum

Málskjúttar:
StÍF: Kristjan Petursson 7, Costin Dumitrescu 7(2), Artur Johansen 6, Marius Joensen 3, Andre Danielsen 2, Leivur Justinussen 1, Alexandur Johansen 1, Pauli Poulsen 1, Poli Hansen 1
Kyndil: Bjarni Wardum 8(3), Rúni Poulsen 6, Heini Bendtsen 5, Jónleif Sólsker 4, Uni Wardum 3, Høgni Klein 3, Hans Áki Dal-Christiansen 3, Regin M. Petersen 1, Janus Einar Sørensen 1
Brotskøst: StÍF 5, Kyndil 3
Útvísingar: StÍF 3, Kyndil 6
Dómarar úr Neistanum: Hjalmar Petersen og Kristian Johansen. Høvdu frá fyrsta bríksli› eitt fast tak um dystin, og hóast mótmælini onkunti› vóru har›lig, var onganti› nakar ivi at hóma teirra millum.

Stø›an 1. Deild menn

		dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	málmunur	stig
1	VÍF	9	9	-	0	-	0	303	218	85	18
2	StÍF	9	5	-	1	-	3	268	242	26	11
3	Kyndil	8	4	-	2	-	2	233	202	31	10
4	H71	8	3	-	0	-	5	214	228	-14	6
5	Neistin	8	3	-	0	-	5	188	206	-18	6
6	Tjaldur	9	3	-	0	-	6	205	275	-70	6
7	KÍF	9	1	-	1	-	7	198	238	-40	3